# Betur enn væntað hjá M&S

Bretska handilsketan Marks & Spencer kunngjørdi í gjár, at sølan er ikki minkað so nógv, sum fyritøkan upprunaliga hevði væntað orsakað av fíggjarkreppuni. Tey seinastu tølini vísa, at sølan er minkað 4,2 prosent í teimum handlunum, sum hava verið opnir í minst eitt ár. Tað er væl minni enn væntað, tí serfrrøðingar høvdu sagt, at sølan helst mundi vera minkað umleið sjey prosent. Partabrøvini í Marks & Spencer hækkaðu umleið 10 prosent í virði á virðisbrævamarknaðinum London, tá fyritøkan hevði kunngjørt gongdina. Fyrr í ár boðaði M&S frá, at fyritøkan ætlaði at lata 27 handlar aftur og at koyra 1.230 starvsfólk til hús.




# Fer ikki tómhentur úr starvinum

Rick Wagoner, sum fór frá sum stjóri í amerikonsku bilfyritøkuni General Motors í gjár, fór ikki heilt tómhentur avstað. Ein talsmaður hjá GM segði, at Rick Wagoner fær 20 milliónir dollarar í eftirløn og ymsum viðbótum, sum hann hevur rætt til sambært setanarsáttmálanum. Rick Wagoner, sum er 56 ára gamal, hevur arbeitt hjá General Motors síðani 1977, tá hann var liðugur at útbúgva seg á Harward. Hann vann seg støðugt longri upp í fyritøkuni og hevur verið aðalstjóri og nevndarformaður síðani 2003. Nú fór hann frá eftir áheitan frá stjórnini hjá Barrack Obama, sum hevur latið GM nógvar milliardir dollarar í hjálp.



*Eltalvur er tað, sum virkið fyrst og fremst fæst við at framleiða. Her er Svenn Arni Ellingsgaard í holt við at skrúva upp á eina eltalvu*

virkinum, og fleiri teirra hava verið í starvi til dagin í dag, sigur Eyðun Hansen.

Í dag starvast einir 15 mans á El-talvuvirkinum í Gøtu, og teir fáast fyrst og fremst við at framleiða eltalvur og montera hesar, men eisini er rættiliga fitt av viðlíkahaldsarbeiði at gera.

– Alt er ógvuliga væl útbúgvið fólk við hópinum av royndum, og vit eru serfrøðingar innan talvubygging, innan fyri generatorskipanir umborð á skipum og neyðstreymsanlegg, sigur Eyðun Hansen.

Á virkinum í Norðragøtu er eisini eitt viklingsverkstað, har teir endurvinda generatorar og elektromotorar.

– Hetta kom í 90-unum, tá vit keyptu eitt trotabúgv, eisini fyri at hava enn eitt bein at standa á, so talan ikki bert verður um eltalvur, sigur Eyðun Hansen.

Hann sigur, at tað sjálvandi ikki hevur verið líka nógv at gjørt øll árini, men at teir alla tíðina hava roynt at tillaga seg tíðirnar.

– Undir kreppuni í 90-unum fóru vit niður á seks mans, men talan hevur kortini alla tíðina verið um eina stammu av starvsfólkum á virkinum, so førleikan mistu vit ongantíð. Vit hava eisini hesi árini útbúgvi 17 lærlingar til elektrikarar her á virkinum, sigur Eyðun Hansen.

Hann sigur, at teir ikki enn hava merkt nakað til ta kreppu, sum so nógv verður tosað um.

– Vit merkja kanska ein tendens til, at tíðirnar eru fyri niðurgangandi, men vit hava kortini ikki merkt nakað enn, vit hava enn nóg mikið at gera, sigur Eyðun Hansen.

## Eingin kreppa - enn

So higartil hava teir í Gøtu ikki merkt tað stóra til nakra kreppu, og tað kann eisini hava sína frágreiðing.

– Vit eru innan fyri tænastuvinnuna og vit veita tænastur til skipaflotan millum annað, og tað er ein vinna, sum má haldast gangandi. So tað er væl hugsandi, at júst okkara vinna ikki verður so hart rakt, sigur Eyðun Hansen.

Tað er nakað av nýgerð í løtuni, men hendan nýgerð stavar í størsta mun frá útskiftingum av verandi útbúnað. Og annars er tað viðlíkahald av verandi skipanum.

– Tað er ikki so nógv nýbygging í løtuni, og tí verður tað mest nýgerð í sambandi við umvælingar, sigur Eyðun Hansen.

Tað, sum er serligt fyri El-talvuvirkið, er, at talan er um serfrøði innan økið.

– Tað finast so nógvir elektrikarar, men á okkara øki eru vit serfrøðingar, og tí arbeiða vit fyri elfyritøkur og skipasmiðjur, sum annars hava sínar egnu elektrikarar, sigur Eyðun Hansen.

At virkið liggur í Gøtu heldur eigarin ikki verða nakran vansa. Landfast er til so stóran part av landinum, og tað er lætt at seta seg í ein bil.

– Eg haldi vit liggja væl fyri í Gøtu, tí her er nógvur aktivitetur, bæði skip og onnur virki, sigur Eyðun Hansen.

Hann heldur, at vit eiga at vera varin at tosa ov nógv um kreppu.

– Vit skulu jú heldur ikki tosa eina kreppu í gongd. Rakar hon, so mugu vit bara koma í gongd aftur. Tað hjálpir ikki at síggja ov svart upp á framtíðina, sigur Eyðun Hansen, stjóri í El-talvuvirkinum í Gøtu.



*Jóhannes Sólsker í móttøkuni, har eisini virkið hevur sína goymslu*